# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Deildarleiðari til Ljósmøðratænastuna

Eitt starv sum deildarleiðari á føðigongini í nýstovnaðu Ljósmøðratænastuni er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

Deildarleiðarin hevur, við tilvísing til leiðandi ljósmóðir ábyrgdina av dagliga deildarvirkseminum, starvsfólkaleiðsluni, deildarjáttanini og fakligu menningini.

Í løtuni fer fram ein avbjóðandi bygnaðarbroyting á deildini, m.a. á barsilsøkinum.

**Førleikakrøv**
- prógv og góðkenning sum ljósmóðir
- hollar starvsroyndir innan viðgongu, føðing og barsilstíð
- hevur leiðsluroyndir og/ella er sinnað/ur at fara undir leiðsluútbúgving
- teldukunnleiki

**Vit ynskja ein deildarleiðara, ið**
- fremur sunnan ljósmøðrahugburð
- er eldhugað/ur, áræðin, jalig/ur og framskygd/ur
- hevur góð samskiftis- og samstarvsevni
- hevur áhuga og jaliga tilgongd til fakliga menning av starvsfólkunum
- kann arbeiða sjálvstøðugt

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Jytte Joensen, virk. leiðandi ljósmóðir, lokal 5301, LSjytjo@lsh.fo

**Umsóknarfreistin er** 30. mars 2007 kl. 12.00

## Onnur Størv (sí meira á www.lsh.fo)

**Sjúkrarøktarfrøðingar til B5**
Umsóknarfreistin er 19. mars 2007

**Varaleiðari til B8 (avloysari)**
Umsóknarfreistin er 19. mars 2007

**Læknaskrivari á Skurðdeplinum**
Umsóknarfreistin er 19. mars 2007

**Læknaskrivari á Medisinska deplinum**
Umsóknarfreistin er 20. mars 2007

**Fysioterapeutar (avloysarar)**
Umsóknarfreistin er 20. mars 2007

**Deildarleiðari til A2**
Umsóknarfreistin er 23. mars 2007

**Leiðandi ljósmóðir**
Umsóknarfreistin er 23. mars 2007

**Læknaskrivari á Brádepilin**
Umsóknarfreistin er 23. mars 2007

**Læknaskrivaranæmingar**
Umsóknarfreistin er 26. mars 2007

**Sjúkrarøktarfrøðingur til G3**
Umsóknarfreistin er 26. mars 2007

## Starvsfólk til Goymsluna

Landssjúkrahúsið søkir við hesum eftir einum fólki til okkara góða team á Goymsluni til setan 1. mai 2007, ella sum skjótast eftir hetta.

Vit starvast 6 fólk á Goymsluni, og er arbeiðstíðin vanligar gerandisdagar frá kl. 7.00-15.00.

Arbeiðið verður at hjálpa okkum at geva viðskiftafólki okkara eina enn betri tænastu og lyfta støðið á Goymsluni enn hægri. Vit arbeiða dagliga við at veita øllum viðskiftafólkum innan Heilsuverkið og sjúklingum kring landið ta røktarvøru, teimum tørvar. Harumframt taka vit okkum av vanligum goymslu-, innkeyps- og søluarbeiði.

**Førleikakrøv**
- røsk/raskur, fyrikomandi og dugir væl at tosa við fólk
- góð samstarvsevni og eitt lætt lyndi
- telduførleiki á brúkarstøði

Gott hevði eisini verið, um tú hevur nakað av fakligari vitan innan tól og vørur, sum dagliga verða nýtt í røktini innan Heilsuverkið. Hetta er tó ongin treyt.

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304528 til Guðrið Ellefsen, leiðara á Goymsluni, t-post guel@lsh.fo

**Umsóknarfreistin er** 30. mars 2007 kl. 12.00

## Ljósmóðir til Ljósmøðratænastuna

Eitt starv sum ljósmóðir er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt. Starvsbrøkurin er 0,8 í skiftandi vaktum og tilkallivaktum.

**Førleikakrøv**
- prógv og góðkenning sum ljósmóðir
- sunnur ljósmøðrahugburður
- góð samskiftis- og samstarvsevni
- áhugi fyri mennandi avbjóðingum
- eldhugi, áræði og framskygni
- er ábyrgdarfull/ur og dugir at arbeiða sjálvstøðugt

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Jytte Joensen, virk. leiðandi ljósmóðir, lokal 5301, LSjytjo@lsh.fo

**Umsóknarfreistin er** 30. mars 2007 kl. 12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

Landssjúkrahúsið er meginsjúkrahús Føroya við umleið 20 serlæknaøkjum og 200 seingjaplássum. Tilsamans starvast yvir 800 fólk á Landssjúkrahúsinum, og endamál okkara er at bjóða føroyingum eina góða heilsutænastu á so nógvum økjum sum gjørligt.

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo

# Viðgerð fyri fobi

Tankafeltterapi er ein sera effektivur viðgerðar háttur, sum hjálpir móti fleiri ymiskum trupulleikum – serstakliga sálarligum, men eisini nøkrum likamligum.

Les meira á: www.tankefeltterapi.info.

Fríggjadagin tann 30. mars og leygardagin tann 31. mars kl.13.00 verður skeið í viðgerð av fobium.

Max 8 luttakarar.

Tlf. 318286 -218286 –eftir kl.19.00.

**Jegvan Bæk, sálarfrøðingur**



# TIL SØLU

Eini sera snotulig arkitektteknaði hús til sølu.

Húsini liggja bert 20 min. frá Havnini.

Áhugaði kunnu ringja 272474 ella 253062

Sí annars www.123hjemmeside.dk/hus_leynar

# Málaralærlingur søkist

## Sum bygningsmálari

Lærlingurin skal vera búsitandi í Norðoyggjum ella Eysturoy.

Arbeiðsøkið er allar Føroyar, men tó mest á fastlandinum.

Áhugaði kunnu venda sær til Anskar Hansen á telefon 282136.

**Anskar Hansen**
**Málarameistari**